# Styrkið miðstaðarøkið heldur enn útjagaran

HANS ALBERT HANSEN
Hoyvík



**Førdi politikkurin í 80´unum kollsigldi landið. Vit eru væl á veg at gera tað sama í dag, um vit ikki steðga á og fara at reka ein rationellan politikk, har miðstaðarøkið verður styrkt heldur enn at verða gjørt veikari.**

Ágangurin á miðstaðarøkið er alsamt vaksandi, og sýnist tað sum, at Havnin ongan góðan eigur. Í 80'unum kallaðist tað bygdamenning. Í dag hevur "rættvísisbrandurin" fingið annað navn; nevniliga útjaðaramenning. Landsstýrismaðurin við innlendismálum amputeraði Strandferðsluna fyri vikum síðani fyri at leggja hana í Suðuroy, og eingin gretti eitt orð um tað. *Tað líkist ongum*. Hvussu kann samgongan góðtaka, at ein landsstýrismaðurin sigur starvsfólkunum úr starvi á Strandferðsluni, fyri at geva øðrum starvið uttan nakra haldgóða grundgeving?

Samstundis virkar hann beint ímóti samgonguskjalinum, har tað klárt stendur, at samgongan vil *kanna* møguleikan fyri at *nýggir* stovnar verða lagdir út um landið, og ikki eitt orð um, at man vil flyta verandi stovnar. Mær vitandi er Strandferðslan ikki ein nýggjur stovnur. Loyva vit hesum, er ikki ilt at ímynda sær, hvat næsti leikur verður. Tí har ein skriða er lopin, er onnur væntandi. Hugsandi er, at aðrir landsstýrismenn fara at reka sama lokalpolitik fyri almennar pengar og tveita ráð og stovnar út um alt landið, alt eftir hvar landsstýrismaðurin hevur sínar veljarar. Sostatt kunnu ráð og stovnar flyta rundt í landinum, hvørja ferð nýggir landstyrismenn koma til. Tað verður ein skrúva uttan enda.

Vit hava sanniliga annað at brúka skattgjaldarans pening til. Tað má verða uppgávan hjá teimum, ið varða av teimum ymsu ráðunum og stovnunum at skipa hesi so væl, rationelt og brúkaravinarligt sum gjørligt og at skapa eitt so gott og trygt arbeiðsumhvørvi hjá starvsfólkunum sum til ber. Ein afturvendandi trupulleiki er stóra útskiftingin av starvsfólkum á almennu stovnunum, sum eftir fá ár í umsitingini leita sær út á privata arbeiðsmarknaðin. Einki løgið í tí, tá stovnarnir eru fyri áhaldandi bygnaðarbroytingum og flytan av stovnum út um landið. Eitt gott dømi um hetta er Toll- og Skatt, sum í løtuni liggur í andaleypi m. a. av somu orsøk.

Nú landið seinastu árini hevur havt stóra búskaparliga framgongd, sýnist tað sum euforiin hevur tikið yvirhond, og at alt letur seg gera. Tað er sjálvandi lætt at hoppa upp á vognin og lova í eyst og vest. Men vit mugu ikki gloyma, at fruminntøkurnar hjá landinum stórt sæð einans stava frá fiskivinnuni og blokkstuðlinum. Trupulleikin við hesum er, at fiskurin hevur stert og svimur haðar hann vil, meðan allir flokkar á tingi uttan ein, nú alment hava sagt seg vilja sleppa av við blokkin. Orsakað av lítlu støddini, Føroyar nú einaferð hava, krevst meiri av okkum at reka samfelagið so rationelt sum gjørligt. Ein nátturlig avleiðing er, at vit mugu miðja ímóti at miðsavna heldur enn at spjaða almennu stovnarnar, har vit fáa ein fyrimun av hesum.

Eitt sterkt miðstaðarøki er ein fortreyt fyri búskaparvøkstri og øktari vælferð fyri útjaðaran og alt samfelagið. Fyri at draga okkara útbúnu fólk heim aftur eftir lokna útbúgving, er neyðugt at kunna bjóða áhugaverd arbeiðspláss í miðstaðarøkinum. Tað er ein sannroynd, at fólk helst leita sær til miðstaðarøkini, har virksemið og útboðið av frítíðarvirksemi er stórt. Vit skulu minnast til, at vit kappast við aðrar stórbýir í Evropa um arbeiðsmegina.

Dagsins førdi politikkur virkar at hava sum endamál, at íbúgvarnir á bygd skulu hava somu tilboð og eins góðar tænastur sum fólk í miðstaðarøkinum. Hesin politikkur kann bara enda galið. Vit mugu ásanna, at tað ber ikki til uttan ovurhonds stóran kostnað sum fylgi. Hví kunnu vit ikki lata fólk sjálvi ráða fyri, hvar tey vilja búleikast og góðtaka fylgjurnar av hesum vali. Um ein velur at búgva á bygd, er tað kanska júst fyri at hava ein jarðarteig, kríatúr og fyri at sleppa undan stórbýarresinum, meðan miðstaðarbúgvin dámar "stórbýarlívið", og tað sum hartil hoyrir. Velur tú at búgva í útjaðaranum, so kann ein ikki vænta at hava somu møguleikar sum í miðstaðarøkinum, eins og miðstaðarbúgvin ikki kann vænta somu fyrimunir sum tann, ið býr á bygd.

Fyri at sleppa undan hesum ódámliga ráki, ið kallast útjaðaramenning og sum í evsta føri kann forkoma bæði miðstaði og útjaðara, er neyðugt at skipa Føroyar sum eitt valdømi. Tá fáa vit kanska skúgvað lokalu áhugamálini nakað til viks, har atgongumerkið inn um tinggáttina ofta eru lyftir um bátahylar, tunnlar og onkrar hissini vegastubbar.

Nú ljóðar sum at best er at avtofta bygdirnar, men tað var ikki hugsanin. Men tað skal bara vera skil í galskapinum.

# Lukas - høvundur ápostlasøgunar og Jónas profetur

RICHARD DANIELSEN



Í morgunlestrunum í farnu viku fær Marjun Bæk prestur tað til, at hesir báðir eru ikki heilt álítandi í frásøgnum sínum. Hetta er ikki fyrstu ferð at Marjun Bæk ger seg inn á skriftirnar. Ilt er at síggja, hvat tað er fyri ósamsvar, hon finnur í Ápostlasøguni 15 og í Galatiabrævinum 2. Í báðum førum eru Pætur ápostul og Jákup, hálvbeiggi Jesusar, samdir við Paulus um, at ikki mátti leggjast ok á teir heidningarnar, sum høvdu tikið við trúgv, til at teir máttu verða umskornir og halda lógina. Fyri hesum máttu teir, sum høvdu tað sjónarmiðið, og sum Paulus kallar falskar brøður, boyggja seg.

Lukas er ikki ein, sum bara blakar um seg við orðum, sum vit ikki kunnu taka fyri fult. Hygg bert í evangeliið hjá honum, kap. 1 versini 3-4. Viðvíkjandi Jónasar profetii hevur júst nú um dagarnar staðið grein í bløðunum um, hvat kendur norskur bíbliulærari sigur um hatta, ums. eftir John í Skemmuni. Har verður sagt, at tað er skeivt, tá ið sagt verður, at Jesus varð krossfestur fríggjadag, hann doyði mikudag, stóð har.

Tað er altíð alvorligt at finnast at tí skrivaða orðinum, innblást av Gudi og nyttuligt til lærdóm, sum skrivað stendur. Men tá ið hirðarnir fara at gera tað, er tað enn meiri alvorligt. Teir villeiða fylgið. Tað er ein kendsgerningur, at fólkið – mong - síggja upp til prestin, hann er jú tann lærdi, so hann man vita best, halda tey. Hetta leggur so mikið størri ábyrgd á prestarnar. Eitt er at teir "klóku" føra hetta fram, um at skriftirnar eru mannaorð, sum ikki kann lítast á, men at prestarnir, summir nú í Føroyum eisini, brúka prestaembætið til at sáa iva um orð Guds í hjørtuni, og teir verða ikki átalaðir fyri tað av teimum hægru mynduleikunum í kirkjuni, tað er hugstoytt. Kirkjan hevur lært skeivt upp í gjøgnum øldirnar, men tað hevur verið vart við, at soleiðis skiltu Luther og aðrir tað. Men hetta er nakað nýtt í Føroyum, at teir anngrípa skriftirnar og gera seg klókari enn baði Lukas og Jónas og aðrar.

Nei, skriftin er øll innblást av Gudi og er nyttulig til lærdóm, 2.Tim. 3,16.

Vit kunnu trygt líta á skriftirnar. Jesus sjálvur segði: "Skriftin vikast ikki." Jóh. 10,35. Hevði hon verið mannaorð, sum vit kunnu lúka í eftir okkara høvdi, so var hon ikki brúkilig til nakað sum helst.

Vinarliga við tøkk fyri upptøkuna.

# Gerið so væl, fái tykkum!

ROLF GUTTESEN

Er støðan ikki tann, at meðan føroyskir tíðindamenn skriva um ymsar longdir á flaggstengrum, so hava íslendskir imperialistar og føroyskir halleluja-kapitalistar keypt sterkasta sambandskortið burtur úr politikki?

# Ósmakligi fíggjarligi ágangurin úr Íslandi

VIRGAR T. DALSGAARD



Hektisku og febrilsku koloniserings-tiltøkini úr Íslandi hava nú vart í meira enn sjey ár. Longu tá proklameradu ovurhugaðir íslendskir handilsdreingir í samrøðu við *Sosialin,* at teir vóru *avgjørt ikki* í Føroyum fyri okkara skyld; – teir vóru bara í Føroyum fyri profittin skyld. Teir ætlaðu at tjena pengar í Føroyum. Tað var púra greið tala, og bert fáur átti at undrast á tað.

Men seinni hava bæði føroyskir og íslendskir ørindasveinar roynt at skeikla henda einfalda realitetin við at fortelja ljósareyð ævintýr um, at hesir fíggjarligu imperialistar eru í Føroyum fyri at "hjálpa" okkum!

Hvussu hevur nú íslendska "hjálpin" roynst okkum.? – Ja, fyribils hava naivir føroyingar verið forfardir eygleiðarar til eina ta (procentvís) størstu nationalu europeisku avreiðingina av bæði vinnupotentiali og arbeiðsplássum til grótharðar íslendskar kapital-interessur. Og í næstan hvørjum einstøkum føri hava føroyingar mist bæði umsetning, arbeiðspláss og service-niveau.

Seinasta íslendska kvett-royndin var í síðstu viku, har vit hoyrdu, at teir høvdu roynt at trokað seg inn í eina lítla, men effektiva fyritøku í Hósvík. Hetta var eitt luskut tiltak, sum setti tær lúnsku íslendsku handils-metodurnar í sjónskt relieff. Tíbetur eydnaðist hesi solventu fyritøku at lofta sær, men tað kravdi kapital. Tað er ikki vist, at tann næsta fyritøkan, sum íslendskir spekulantar fáa eyga á, orkar at útvega tann neyðuga kapital, sum krevst fyri at vísa slíkum fíggjarligum álopum aftur.

Vit eiga øll at ynskja hósvíkingum tillukku við sigrinum. Ússaligt var at síggja, hvussu tveir sperdir íslendingar royndu at møsna afturímóti. Teir kundu ikki við einum orði, hóast teir brúktu nógv blaðpláss, vísa nøkrum aftur, sum Thor-menn høvdu skrivað. Íslendingarnir vavdu seg inn í irrelevant uttanumtos. Tí teir høvdu einki sakligt argument at verja seg við.

**Skulu vit bara sita hendur í favn?**

Ætla løgtingsmenn bara at hyggja at, meðan fremmandur kapitalur otar seg inn í hvørja føroyska fyritøku, sum er fíggjarliga interessant.

Hetta hevði aldri gingið, um *Atli Dam*, *Petur Mohr Dam, Hákun Djurhuus* ella *Kristian Djurhuus* høvdu verið løgmenn. Hetta er beinleiðis at máa grundarlagið undan tí spinkla føroyska vinnulívinum, sum aldri hevur og aldri kemur at kunna eksistera í heilt fríari kapping.

Íslendingar sjálvir kenna sítt mark og eru avgjørt ikki liberalir. Teir eru millum teir harðastu protektionistar í Europa, og teir hava tað mest subsidieraða vinnulívið um okkara leiðir. Teir hava erkent, at teir aldri høvdu klárað seg í heilt fríari internationalari kapping. – hví skulu *vit* so skjóta okkum í fótin við at "spæla" býttdjarvir og ovurkátir liberalistar?

Men tann størsti sorgarleikurin er at síggja, hvussu nógvir av okkara landsmonnum renna ørindir fyri íslendingar og eru við til at beina fyri okkara lívsgrundarlagi. Tað kann ikki nóg ofta takast uppaftur, at hesir íslendsku sambandsmenn eru líka so farligir í dag, sum teir norsku sambandsmenn, ið runnu ódámlig ørindi fyri Norra og norskar interessur í tretivunum.

Føroyskir nationalistar hava aloftast leitað sær til útlendska boppu. – Antin teir nú hava verið norskir, russiskir ella sum nú íslendskir sambandsmenn. Tað er upp á tíðina, at gekkaskorturin verður skræddur av tí ódámliga loysingarliðinum, sum "ræðist" alt danskt, men krýpur fyri og letur seg eirindaleyst kúga av útlendskum valdi.

Tað er bæði láturligur og harmiligur symbolikkur í, at íslendska sendivaldið gav *Pouli Mohr*, konsli og stjóra eitt *boksl* í skilnaðargávu fyri sítt arbeiði sum íslendskur ørindasveinur í Føroyum. Íslendingar eru ikki í iva um, at teir fullkomuliga hava tamarhaldið á slíkum stjóra.